FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 26. mars 2021
J. nr.: 21/00136
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-103/2020 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um ferðaætlanina á leið 400

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Heldur landsstýrismaðurin tað vera nøktandi tænasta til norðoyingar og eysturoyingar bert at hava møguleika at ferðast beinleiðis við SSL gjøgnum Eysturoyartunnilin tvær ferðir um samdøgrið, kl. 6.25 á morgni og kl. 16.15 seinnapart?

2. Heldur landsstýrismaðurin, at hetta tilboðið frá SSL fer at fáa norðoyingar og eysturoyingar at brúka tunnilin meira?

3. Fer landsstýrismaðurin at gera nakað fyri at fáa eitt betri samband gjøgnum tunnilin?

Svar:
Landsstýrismaðurin arbeiðir fyri at ferðasambandið er gott um alt landið. Eysturoyartunnilin letur upp fyri nógvum møguleikum, og er ein góð ferðaætlan hjá Bygdaleiðum av stórum týdningi fyri at knýta samfelagið enn nærri saman.

Sum kunnugt hevur uppskot til broytta ferðaætlan hjá Bygdaleiðum júst verið til hoyringar. Tað komu 86 hoyringarsvar inn, og er Strandferðslan nú farin undir at viðgera hoyringarsvarini, eisini í samstarvi við áhugapartar, áðrenn endalig ferðaætlan verður gjørd. Hetta verður ikki sum sambært upprunaligu ætlanini tann 1. apríl. Næstu vikurnar verður viðgjørt nærri uppskot til ferðaætlan.

Tað er givið, at norðoyingar, eysturoyingar, suðurstreymoyingar, og øll onnur, skulu hava nøktandi ferðasamband gjøgnum Eysturoyartunnilin, millum miðstaðarøkið og norður Føroyar, til gagns fyri vinnu og borgarar.

Viðurskifti viðvíkjandi gjaldi í Eysturoyartunlinum, hevur í ávísan mun verið ein avbjóðing, tí tað í tillagingunum eisini hevur verið neyðugt, at halda seg innanfyri galdandi fíggjarkarmar og sáttmálar við bussveitarar.

Tað ber ikki til at ganga øllum ynskjum til ferðaætlanina á møti, tí tað røkkur játtanin ikki til. Ein møguleiki er, at kommurnar eisini eru við til at fíggja ferðaætlanina, og at land og kommunur samstarva í størri mun um bussflutning.

Tinganes, 26. mars 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum